# Ólógligur butterfly knívur nýttur í álopi



Tað var ein sovorðin knívur, ið varð nýttur í badmintonhøllini leygarnáttina

**Drongurin, sum misti sjónina í øðrum eyganum leygarnáttina, varð álopin við einum ólógligum butterfly knívi, sigur løgreglan**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Ein butterfly knívur er soleiðis gjørdur, at blaðið er inni í skaftinum. Skaftið kann latast upp, so tað fer í tvíningar og verður heft saman aftur, og so er knívurin klárur at brúka. Hesin knívurin kann ikki keypast í Føroyum, tí tað er ólógligt at selja og eiga slík vápn.

Blaðið á hesum knívinum er einar seks sentimetrar til longdar og kann tí vera ógvuliga vandamikið.

Knívarnir kunnu keypast í Danmark og annars í flestu londum kring okkum. Eisini ber til at bíleggja knívarnar heim til Føroyar.

– Tað er ógvuliga vanligt, at dreingir í Føroyum ganga við knívi, men tað er ógvuliga óheppið, at teir fara vápnaðir í býin, sigur Rutt Glerup, sum hevur hetta málið um hendi.

### Meldaði fyrst

Tað var annars drongurin við knívinum, sum møtti upp niðri á løgreglustøðini og meldaði hin drongin fyri harðskap. Hann hevði fingið eina rivu omanfyri annað eygað og hevði fingið okkurt slag í andliti.

Løgreglan fekk einki at vita um tann álvarsama skaðan hjá hinum dronginum fyrr enn nakað seinni. Løgreglan fer nú at kanna málið nærri við at avhoyra allar partar, sum varða av málinum.

Rutt Glerup sigur annars, at eingi sjónlig tekin vóru um, at rúsevni ella rúsdrekka vóru við í hendingini.

Álopni drongurin, sum er 15 ár, hevur mist sjónina í øðrum eyganum, sum er illa farið, og var eisini stungin í økslina og í beinið. Hann fekk skaðan inni í badmintonhøllini, tá hann varð álopin av einum 14 ára gomlum drongi.

Tá talan er um so ungar dreingir, so skal barnaverndin vera við, tá teir verða avhoyrdir. Hon skal eisini taka neyðugu stigini aftaná saman við familjuni. Hetta kann vera at senda barnið til eitt annað stað at búgva eina tíð ella at fáa til vega sálarliga hjálp.

## Konsertrøð byrjar

Týsdagin 11. september klokkan 19.30 verður tann fyrsta konsertin í Orfeus røðini, sum verður komandi vetur. Tann fyrsta konsertin er í skúlanum í Trongisvági.

Mikudagin 12. september somuleiðis klokkan 19.30 verður næsta konsertin í Orfeus røðini. Henda konsertin er í Norðurlandahúsinum í Havn.

Skráin fyri báðar konsertirnar er hin sama. Tónleikararnir er tey bæði Guðrún Jóhanna Ólafsdóttir, sum spælir mezzosopran, og Víkingur Heiðar Ólafsson, ið spælir klaver. Tey eru bæði úr Íslandi.

Tey fara at framføra verk eftir Sigfus Einarsson, Jón Ásgeirsson, Sigfús Halldórsson, Maurice Ravel, Hector Berlioz, Ludvig van Beethoven, írskt tjóðarlag, Richard Hageman, Grace Williams, Frederic Chopin, Georges Bizet, Giacomo Puccini og Giachino Rossini.

Atgongumerkini til konsertirnar kosta 80 krónur. Eisini ber til at ogna sær atgonguprógv til allar konsertirnar fyri 275 krónur.

# Býráðið mælir til frávik



Mikið stríð stóðst av hesum neystunum, har ein maður skuldi byggja eini sethús. Býráðið hevur nú givið grønt ljóst, men Løgmansskrivstovan og almenningurin skal góðkenna hetta áðrenn

**Ein meiriluti í Tórshavnar Býráði mælir til at gera frávik frá byggisamtyktini, so at byggingin av einum sethúsum úti í Bakka kann halda fram**

BÝRÁÐ
*Stefan í Skorini*

Fyrr í summar fór ein maður undir at byggja eini sethús omaná eina neystagrund úti í Bakka í Tinganesi. Løgmansskrivstovan álegði tó býráðnum at steðga byggingini, til formligu viðurskiftini viðvíkjandi fráviki frá byggisamtyktini vóru fingin í rættlag.

Málið hevur nú verið fyri á býráðsfundi, og ein meiriluti í býráðnum samtykkir, at arbeiðið kann halda fram. Frávik er soleiðis gjørt í byggisamtyktini, tí tað er upprunaliga ikki loyvi at byggja á hesum staðnum.

Ein minniluti í byggi- og býarsamskipanarnevndini, Súrður Olsen og Bjarti Mohr, tóku undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, um at byggingin kann halda áfram, og at útsjóndin verður tillagað umhvørvinum í samráð við býararktitektin.

Jógvan Arge og Hildur Eyðunsdóttir halda ikki, at loyvi kann gevast til byggingina, uttan at broytingar verða gjørdar í byggisamtyktini, og tí skal málið fyri býráðið.

Mánakvøldið 10. september varð atkvøtt um tilmæli frá Sjúrði Olsen og Bjarta Mohr. Tað var samtykt við sjey atkvøðum fyri frá øllum samgongulimunum uttan Heðini Mortensen, sum ikki greiddi atkvøðu. Øll andstøðan atkvøddi ímóti.

Enn er málið tó ikki avgreitt. Tað skal fyrst leggjast fyri Løgmansskrivstovuna, sum skal góðkenna fráviki í byggisamtyktini, og tað skal eisini leggjast fyri almenningin.



# Samráðast um altjóða trygd á sjónum



Í sambandi við ætlaðu yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum eru føroysk og donsk embætisfólk í hesum døgum í London og samráðast við IMO um møguleikan fyri, at Føroyar fáa atlimaskap í hesum altjóða felagsskapi. IMO er felagsskapurin, ið setur minstukrøvini fyri trygd á sjónum

**Føroysk og donsk embætisfólk eru í løtuni í London á fundi við IMO um møguleikan fyri, at Føroyar fáa atlimaskap í hesum altjóða felagsskapi. IMO er felagsskapurin, ið ásetir minstukrøvini fyri trygd umborð á skipum og dálking av havinum. Føroyar ynskja limaskap í sambandi við yvirtøkua av Skipaeftirlitinum**

TRYGD Á SJÓNUM
*John Johannessen*

Komandi føroyska Skipaeftirlitið skal seta trygdarkrøv á altjóða støði.

Hetta hevur Jørgen Niclassen, landsstýrismaður við ábyrgdini fyri trygd á sjónum, sett sær fyri. Og tí ynskir hann eisini, at Føroyar fáa sjálvstøðugan atlimaskap í IMO, sum er altjóða felagsskapurin, ið ásetir minstukrøvini fyri trygd umborð á skipum.

Í hesum sambandi eru føroysk og donsk embætisfólk í hesum døgum í London á fundi við IMO um møguleikan fyri, at Føroyar fáa atlimaskap. Á fundinum eru fýra føroysk embætisfólk, harímillum Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini á Løgmansskrivstovuni, og millum donsku embætisfólkini frá Uttanríkisráðnum er føroyingurin, Árni Olafson.

### Óvanligur limaskapur

Tað er ikki serliga vanligt, at lond fáa atlimaskap í IMO. Í løtu eru tað bara tvey lond við atlimaskapi í IMO. Hesi eru Hong Kong og Makao. Men Jørgen Niclassen, landsstýrismaður, vónar kortini, at tað fer at eydnast hjá Føroyum at fáa hendan atlimaskap.

At fáa atlimaskap í IMO merkir, at vit fáa øll rættindi og allar skyldur í felagsskapinum, sum limalondini hava, men vit fáa ikki atkvøðurætt.

Eydnast tað okkum ikki at fáa atlimaskap í IMO, hava vit ein annan møguleika at fáa fótin innum. Hesin er, at vit koma upp í sum partur av danska ríkinum. Verður hetta støða okkara, eru vit bert eygleiðarar.

Ætlanin er, at Skipaeftirlitið skal á føroyskar hendur 1. januar í 2002. Og innan ta tíð skal spurningurin um støðu okkara í IMO verða avgreiddur.

### Broyta krøvini

Í sambandi við, at Skipaeftirlitið verður føroyskt, roknar Jørgen Niclassen við, at krøvini, sum vit hava í dag við danska Skipaeftirlitinum í Føroyum, verða eitt sindur broytt – men tó innan fyri krøvini hjá IMO.

– Við tíðini fara krøvini helst at verða lagað eitt sindur til føroysk viðurskifti. Danska Skipaeftirlitið setir strong krøv til ferjur og farmaskip, meðan tað setur linari krøv til smábátar. Samstundis eru krøvini í Íslandi hørð til smábátar. Hetta kemur av, at danir hava so nógvar ferjur og farmaskip og fáar smábátar. Í Føroyum hava vit nógvar smábátar, og fer eitt føroyskt eftirlit tí helst at seta strangari krøv til smábátar, enn tað verandi danska, greiðir Jørgen Niclassen frá.

# Politiskt vikuskifti í væntu

**Samstundis, sum Tjóðveldisfeløg kring landið fríggjadagin minnast 55 ára dagin fyri fólkaatkvøðuna 14. september í 1946, heldur Javnaðarflokkurin um vikuskiftið landsfund, har valskrá til komandi løgtingsval verður løgd fram**

POLITIKKUR
*John Johannessen*

Nógvur politikkur er á skránni fyri komandi vikuskifti. Fríggjadagin er 14. september. Og í hesum sambandi fara Tjóðveldisfeløg kring landið og Unga Tjóðveldi at skipa fyri tiltøkum í sambandi við 55 ára dagin fyri fólkaatkvøðuna í 1946.

Hóast 14. september vanliga verður settur í samband við Tjóðveldisflokkin, hevur Javnaðarflokkurin valt at seta sín árliga landsfund hendan dagin.

Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum verður í Vestmanna, og byrjar fríggjakvøldið 14. september klokkan 20. Tað áhugaverdasta á landsfundinum er tó sett á skránna fyri leygardagin. Leygardagurin byrjar við, at Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, leggur fram sína formansfrágreiðing. Men seinni fer flokkurin at leggja fram eina nýggja valsrká, sum flokkurin hevur gjørt til komandi løgtingsval.

Valskráin skal viðgerast og góðkennast á landsfundinum, áðrenn hon verður almannakunngjørd.

Sosialurin skilir, at hóast Javnaðarflokkurin hevur valt at seta landsfund sín 14. september, er hetta ikki tí, at flokkurin hevur broytt støðu í fullveldismálinum. Sum blaðið skilir, fer valskráin hjá Javnaðarflokkinum at leggja dent á onnur virði, ið hava meira við hugsjónina hjá Javnaðarflokkinum at gera.

